
JAVNAÐARFLOKKURIN
C
Býráðsval 2024 – Tórshavnar kommuna



# EIN RÚMLIG KOMMUNA

Tað er gott at liva og virka í Tórshavnar kommunu, men tað kann altíð gerast betri.

Tí taka vit á Javnaðarlistanum fegin enn eitt tørn kring borðið á Vaglinum.

Vit vilja, at fólk skulu trívast, tí seta vit bleytu virðini fremst.

Ein tryggur og innihaldsríkur gerandisdagur er eftir okkara tykki fortreytin fyri tí góða lívinum. Tað krevur góðar og fjølbroyttar bústaðir, tryggar og dyggar vælferðartænastur og spennandi og mennandi frítíðartilboð.

Tórshavnar kommuna skal vera ein modernað og rúmlig kommuna, har ein og hvør kennir seg heima; ung sum eldri.

Okkum tørvar fleiri fólk til mongu arbeiðsplássini í økinum, bæði alment og privat. Tí vilja vit skapa umstøður fyri fólkavøkstri. Tað krevur fleiri bústaðir til ymsar tørvir og ymsu tíðarskeiðini í lívinum. So uppaftur fleiri velja Havnina ella eina av bygdunum í kommununi, sum sín heimstað.









# HETTA VILJA VIT

**Børn** – Tað skal vera gott at vaksa upp í Tórshavnar Kommunu. Vit vilja støðugt styrkja og útbyggja dagstovnaøkið, so bæði børn og starvsfólk trívast. Høg fakligheit, góðar normeringar og mennandi karmar skulu vera í hásæti.

**Eldraár** – Vit vilja skapa fleiri bústaðar- og røktartilboð til fólk, sum við árunum fáa nýggjar tørvir. Tryggar og hugnaligar eldradeplar við smærri, tættbygdum búeindum, har frítíðar- og heilsutilboð eru tøk í nærumhvørvinum.

**Bústaðir** – Vit skulu hava fleiri bústaðir til ymsar tørvir. Til lesandi og eldri, almannagagnligar bústaðir, lutaíbúðir, eigara- og leigaraíbúðir og sethús. Kommunan skal vera við í byggiverkætlanum við leigubústøðum fyri ung og eldri.

**Frítíð** – Børn og ung hava rætt til virkið og mennandi frítíðarlív. Í Tórshavnar kommunu skulu vit hava frítíðarkort, so inntøkan ikki er avgerandi fyri meiningsfullum frítíðarlívi. Vit skulu útbyggja og menna bókasavnsøkið, eisini skulu vit hava fleiri innan- og uttandura spælipláss. Somuleiðis skal kommunan brynjast til Oyggjaleikirnar í 2027.

**Umhvørvi** – Gøtur og súkklubreytir skulu útbyggjast, so tað verður lættari at seta bilin. Kloakkirnar skulu framhaldandi umvælast inni í býnum og beinast út á streymasjógv. Rottutýningin skal vera meira miðvís. Eisini skulu grannaløg hava betri umstøður at skilja burturkast og at dyrkja grønmeti. Vit halda fram við grøna orkuskiftinum.

**Vinna** – Vit ynskja eitt fjølbroytt vinnulív og bestu karmar fyri íverksetan, handils- og vinnulívið. Átøk fyri fólkavøkstri skulu bøta um møguleikarnar at finna skikkað starvsfólk til mongu arbeiðsplássini í kommununi. Vinnuøki skulu útbyggjast í allari kommununi.







# ÚRSLIT

## Bústaðir

| | |
|---|---|
| Undir Kongavarða | 32+8 raðhús |
| Klingrutjørn 2 stig | 45 grundstykkir, sethús |
| Hamarin á Argjum | 42 grundstykkir, sethús |
| | 51 grundstykkir, raðhús |
| | 74 íbúðir |
| Bústaðir við Dalavegin | 36 íbúðir |
| Bústaðir, Blómubrekka | 38 íbúðir |
| Velbastað | 14 grundstykkir, sethút |
| Nólsoy | 8 grundstykkir, sethús (afturat) |

**Nógv privat:**

| | |
|---|---|
| MTV við Sundsvegin | 53 |
| JPV við Landavegin (partar) | 111 íbúðir |
| Mark við Oyggjavegin | 48 íbúðir |
| Lambatrøðin 24/06441 | 8 grundstykkir, sethús |
| Undir Gráasteini (JEP) | 8 + 15 |
| Politistøðin BRONX | 5 íbúðir |
| Kvíggjartún | 18 íbúðir |
| | |
| Stóratjørn 1. Stig (uml.) | 37 grundstykkir, sethús |
| | 40 grundstykkir við randarhúsum til 80 íbúðir |
| | Umfram íbúðarbygningar |


Stuðul til filmsvinnu og list


Røktarheim við íbúðum í Hoyvík


15 mió um árið at umvæla kloakkir


Langhylur


Almenn tiltøk


Útbygging av Tjarnargarði


Innkomuvegur


Hádeild í Skt. Frans


Steinatún


Fleiri dagstovnapláss


Havnará


El-bussar


Størri Býarbókasavn


Borgarahús í Kaldbak


Lendisgøtur


Kollafjørður


Fríðkan av bygdunum


Grøn upphiting

# Tú kennir Javnaðarflokkin í Tórshavnar býráð

Tú veitst, hvørjum vit standa fyri.
Tú hevur upplivað menningina.
Lat hana halda fram til 2028.

## Vel lista C tann 12. november




JAVNAÐARFLOKKURIN